## Danski handilsflotin økist skjótari enn nakrantíð

Danir hava undirskrivað sáttmálar til nýggj skip fyri í alt 85 milliardir krónir, vísa nýggjastu tølini frá Danmarks Rederiforening. Hetta er størsta økingin nakrantíð. Men døpru búskaparligu útlitini bæði í Evropa og USA fara at viðføra, at danir eisini fara at verða meira varnir, skrivar Børsen. - Fyrra hálvár í ár økist danski handilsflotin við 15 prosentum, og tá hugt verður eftir sáttmálum, ið eru gjørdir av nýggjum og gomlum skipum, ið koma undir donskum flaggi, kann roknast við, at handilsflotin økist einum 20 til 25 prosentum í ár, sigur Jan Fritz Hansen, varastjóri í Danmarks rederiforening. Dansi handilsflotin er nú tvífalt so stórur, ið hann var í 2000.



*- Tað kemur at kosta flokkinum dýrt, um leiðslan ynskir eina uppgerð við ríkissinnaða vongin av Javnaðarflokkinum, staðfestir Hendrik Old í samband við at Løgmaður eftirlýsir innanhýsis ideologiskt kjak um millum annað ríkisrættarligu støðuna*

# Javnaðarflokkurin syndrast

**Løgmaður eftirlýsir innanhýsis kjak í Javnaðarflokkinum um ríkisrættarligu støðuna. Men hetta kann kosta flokkinum dýrt, halda fyrrverandi tinglimir hjá flokkinum**

POLITIKKUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Um løgmaður ynskir eina uppgerð við ríkissinnaða vongin í Javnaðarflokkinum, so fer tað at kosta dýrt. Hetta sigur Hendrik Old, fyrrverandi tinglimur fyri Javnaðarflokkin, í samband við at løgmaður eftirlýsir ideologiskt kjak um millum annað ríkisrættarligu støðuna.

- Ein stórur partur av Javnaðarflokkinum er sinnaður at verða innanfyri ríkið. Hetta er meirilutin, og eg dugi ikki at ímynda mær, at leiðslan ynskir eina uppgerð við øll hesi fólkini, sigur Hendrik Old.

Hann vísir á, at flokkurin varð stovnaður sum alternativ til loysingarflokkarnar. Og eftir tí sum hann veit, so er støðan hjá flestu veljarum floksins ikki broytt.

- Tí skilji eg ikki, hvat hetta kjakið skal brúkast til. Og løgmaður hevur ikki veruliga greitt frá, hvat hann ynskir við hesum kjakinum, sigur hann.

- Skal landsfundurin taka eina uppgerð um hetta mál, so verður tað eitt minniligt kjak, tí sjálvandi fer meirilutin ikki at lata sær hetta lindað.

- Vandin er, at flokkurin minkar burtur í einki. Tí hóast ríkissinnaði parturin av flokkinum er tann meira friðarligi parturin, so er hann eisini sterkur, staðfestir Hendrik Old, sum ikki stillaði upp aftur til seinasta val.

Hendrik Old væntar, at um Javnaðarflokkurin verður ein loysingarflokkur, minkar tingmannatalið í fyrsta umfarið niður í tvey fólk.

- Tað kemur at kosta dýrt. Ikki bara í Suðuroy og Sandoy, men eisini í Vágunum og Eysturoy, og partvís eisini í Havn aðrastaðni, sigur hann avgjørdur.

### Áhaldandi pragmatiskt kjak

Kristian Magnussen, fyrverandi formaður fyri tingbólkin hjá Javnaðarflokkinum, skilur heldur ikki ynski um ideologiskt kjak. Ikki tí hann ræðist kjakið, men tí flokkurin longu nú hevur hetta kjakið.

- Vit eru eitt lítið land, og allir flokkarnar mugu fevna um ein breiðan veljaraskara. Tí eru vit noydd at vera pragmatisk og praktisk. Og hetta er júst grundarlagið undir ríkisrættarliga kjakinum hjá Javnaðarflokkinum, staðfestir Kristian Magnussen.

Tí skilur hann ikki, at flokkurin nú skal hava tørv á einum nýggjum kjakið. Javnaðarflokkurin hevur ongantíð verið antin sambands- ella loysingarflokkur, og eingin grund er at broyta hetta, heldur hann.

Hann er tí samdur við Hendrik Old um, at Javnaðarflokkurin ikki hevur brúk fyri einari uppgerð á ríkisrættarliga økinum.



*- Javnaðarflokkurin eigur at vísa solidaritet við teim veiku pørtunum av samfelagnum, og hetta umfatar eisini Sandoynna, heldur Kristian Magnussen, fyrrverandi formaður fyri tingbólkin hjá Javnaðarflokkinum. Tí heldur hann, at prátið um at koyra Gerhard Lognberg úr flokkinum er púra burturvið*

# Tjóðveldi eigur trupulleikan

**Javnaðarflokkurin eigur at vera meira greiður í sínum solidariteti við útjaðaran, halda fyrrverandi tinglimir hjá flokkinum, sum iðra seg um, at mótstøðan hjá Tjóveldi móti tunnlinum nú er endað sum ein innanhýsis trupulleiki hjá Javnaðarflokkinum.**

POLITIKKUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Hendrik Old iðrar seg um, at kjakið um Sandoyartunnilin er endað sum eitt innanhýsis stríð í Javnaðarflokkinum, tí Javnaðarflokkurin hevur alla tíðina verið samdur um, at tunnilin skal gerast.

- Tað er Tjóðveldi, sum ikki vil, men hetta kemur als ikki greitt fram í miðlunum. Landsstýriskvinnan í samferðslumálum var púra greið í valstríðnum um, at hon ikki ynskti nakran Sandoyartunnil.

- Hon er eisini komin í landsstýrissessin frá gøtuni, so at siga. Tí er tað kanska ikki so løgið, at hon ikki hevur dugað at takla samstarvið við politiska viljan í Løgtinginum, heldur Hendrik Old.

Kristian Magnussen, sum var formaður fyri tingbólkin hjá Javnaðarflokkinum seinasta valskeið, og sostatt eisini hevur samstarvað við Gerhard Lognberg, heldur eisini, at málið um Sandoyartunnilin kundi verið betri handfarið.

- Trupulleikin liggur sjálvandi ikki bara á einum stað. Og vit kunnu bara staðfesta, at ósemjan hevur fingið loyv at fara ov langt, sigur hann

Fyrrverandi formaðurin fyri tingbólkin staðfestir, at Javnaðarflokkurin eigur at vísa solidaritet við teimum veiku í samfelagnum, og hetta umfatar eisini útjaðaran.

- Sandoyingar og Suðringar eru í neyð, tí teir síggja at menningin fer fram aðrastaðni, tí er tað ikki so løgið, at fólk berjast fyri økjunum. Og Javnaðarflokkurin eigur at vera partur av hesum bardaga, heldur Kristian Magnussen.

- Javnaðarhugsjónin byggir á at standa undir liðini á teimum marginaliseraðu pørtunum av samfelagnum, staðfestir hann.

Hvørki Hendrik Old ella Kristian Magnussen vænta, at Gerhard Lognberg verður blakaður úr flokkinum.

- Skal man ekskludera fólk fyri at berjast fyri einum veikum útjaðara, spyr Kristian Magnussen.

- Eg dugi slett ikki at síggja, at vit yvirhøvur skulu tosa um útvísing. Verður hann koyrdur úr flokkinum, siga vit við ein stóran veljaraskara, at tey ikki vælkomin í Javnaðarflokkinum, staðfestir hann.